Starvslýsing

Stuðulstænastan

## 5 stuðulsfólk til brúkara í Suðuroy

Málbólkurin hjá Stuðulstænastuni er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá stuðlunum fevnir um**
- Røkt og aktivering av einum respiratorsjúklingi.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Er stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.

**Stuðulstænastan kann bjóða**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Kunning og upplæring í arbeiðinum og supervision.

**Lønar- og setanartreytir**
Talan er um 5 føst størv innan Nærverkið og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi, dag-, kvøld-, nátt- og vikuskiftisarbeiði.

Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar um størvini eru at fáa hjá Jeannu í Lágabø, økisleiðara á tlf. 373907 og hjá deildarleiðaranum Regin Johansen á tlf. 360000.

Størvini verða sett 1. januar 2008 ella skjótast aftaná, treytað av, at játtan er fyri 2008.

**Umsókn**
Umsóknir skulu sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Stílað.: Regin Johansen
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin: 22.12.2007.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo







Byrjar 8. januar 2008
Tilmelding á tlf. 216021

KOYRI FRÁLÆRA
Hoyvíksvegur 61
21 60 21

FORM

Betongarbeiði

Sethúsagrundir
Garðar
Lendisgólv
og annað

Sp/f. FORM
Skákið 13
FO 480 Skáli
Tlf. 442600
212602
form@form.fo

JÓLAFRÍ

**Asfaltverkið og skervverkini halda jólafrí**

Asfaltverkið í Hundsarabotni og skervverkini kring landið eru stongd frá 22. desember til og við 2. januar.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo
LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*